UTTAN ÚR HEIMI

# Hans Blix boðin til Bagdad

**Irakska stjórnin hevur boðið svenska ST-vápnaeftirlits-manninum Hans Blix til Bagdad at tosa um arbeiðið hjá eftirlits-monnunum**

IRAK
*Árni Joensen*

Líkt er til, at Irak hevur hug at slaka fyri trýstinum frá ST, ES, Russlandi og øðrum, sum hava kravt, at myndugleikarnir í Bagdad skulu lata vápnaeftirlitsmenninar hjá ST sleppa aftur til landið at halda fram við sínum arbeiði.

Í hvussu er hevur ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, fingið bræv frá irakska uttanríkisráðharranum, Naji Sabri, har hesin boðar frá, at svenski leiðarin hjá vápnaeftirlitsmonnunum, Hans Blix, er vælkomin til Bagdad at tingast við iraksku myndugleikarnar um, hvussu eftirlitsarbeiðið kann takast uppaftur.

Í brævinum skrivar Sabri, at ST og Irak eiga í felag at kanna, hvussu Irak hevur fylgt teimum ásetingunum, sum eru álagdar landinum.

Hans Brix hevur fyrr sagt, at hann fer ikki undir nakað kanningararbeiði í Irak, fyrr enn allir eftirlitsmenninir eru komnir til landið.

Brævið frá Naji Sabri er ikki tann einasta ábendingin um, at Irak er sinnað at samstarva við ST um vápnaeftirlit. Hósdagin var Taha Yassin Ramadan, varaforseti í irakska sjónvarpinum, har hann mælti til, at Irak hevur samstarvið við ST uppaftur. Varaforsetin segði, at stjórnin er til reiðar at samskifta við ST fyri at finna ein arbeiðshátt, sum kann bera í sær, at Irak lagar seg eftir teimum samtyktum, sum ST-trygdarráðið hevur gjørt.

Irakski varaforsetin nýtti samstundis høvi at vísa aftur amerikansku skuldsetingunum um, at Irak er í ferð við at gera hópoyðingarvápn.

– Hetta eru ósannindi, sum USA og Bretland hava sett í gongd fyri at rættvísgera teirra egnu atgerðir ímóti Irak, segði Taha Yassin Ramadan, varaforseti.

Í Washington endurtók George W. Bush, forseti fyrradagin, at USA fer at virka fyri fleiri búskaparligum tiltøkum ímóti Irak, tí landsins leiðslan stendur aftan fyri virksemi, sum er ímóti amerikanskum áhugamálum. Forsetin duldi heldur ikki fyri, at hann framvegis hevur sum mál at fáa Saddam Hussein, forseta frá.

Nú er so spurningurin, hvat kann koma burtur úr innbjóðingini til Hans Blix.



*Svenski ST-vápnaeftirlitsmaðurin Hans Blix hevur nú fingið innbjóðing at koma til Bagdad at tingast um, hvussu eftirlitsarbeiðið kann takast uppaftur*

# Haider mælir til evropeiskt høgrasamstarv

**Jørg Haider og eysturríkski Frælsisflokkurin ætla at samstarva við aðrar høgraflokkar í Evropa**

EVROPAPOLITIKKUR
*Árni Joensen*

Jørg Haider, sum stovnaði eysturríkska Frælsisflokkin, hevur saman við forkvinnu floksins, Susanne Riess-Passer, boðað frá, at flokkurin fer at royna at fáa samstarv við brøðraflokkar í øðrum evropeiskum londum. Endamálið er at fáa ein felags høgralista til valið til ES-tjóðartingið í 2009.

Jørg Haider hevur longu skatta dýpið. Í síðstu viku hitti hann formannin í niðurlendska flokkinum Vlaams Blok, og hann hevði eisini fund við eitt umboð fyri tann italska flokkin Liga Norður. Jørg Haider, sum sjálvur skýrir seg upphavsmannin til ta evropeisku populismuna, hevur fyrr sagt, at málsetningur hansara er at stovna eina evropeiska rørslu, sum skal fáa navnið »Tað nýggja Evropa«.

Á einum tíðindafundi hósdagin segði Haider, at tann ytsti høgravongurin hevur sera góðar møguleikar í Italia, Niðurlondum og Danmark.

Susanne Riess-Passer, forkvinna í Frælsisflokkinum, hevur fyrr sagt, at hon tekur ikki undir við sjónarmiðunum hjá Jørg Haider um »Tað nýggja Evropa«, og ósemjan teirra millum hevur hótt við at spreingja flokkin. Haider sigur, at hann fer ikki at hjálpa Frælsisflokkinum til næsta val í Eysturríki, men í spurninginum um ein felags høgralista til ES-valið í 2009 eru tey bæði samd.

# Afghanar berjast framvegis sínamillum

**Í gjár vóru harðir bardagar millum hermenn hjá tveimum krígsharrum har vesturi í Afghanistan. Minst 50 lógu eftirá**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Spenningurin millum teir ymsu ættarbólkarnar í Afghanistan stendur við, sjálvt um tað herfyri eydnaðist at fáa bólkarnar at semjast um at manna eina skiftisstjórn.

Seinastu dagarnar hava harðir bardagar verið millum menn hjá pasjtunska krígsharranum Karim Khan og menn hjá tadjikiska krígsharranum Ismail Khan. Bardagarnir vóru har vesturi í landinum, og tíðindastovurnar skriva, at tadjikisku hermenninir høvdu stríðsvognar og aðra tunga herútgerð, og at fleiri hús hjá pasjtunum vórðu løgd í oyði. Pakistansk tíðindi vilja vera við, at bara í gjár doyðu minst 50 pasjtunar í bardøgunum.

Teir báðir krígsharrarnir berjast um valdið í økjum, sum Taliban mátti lata frá sær undir krígnum seinasta heyst. Bardagarnir hava verið serliga harðir í landspartinum Herat, tí pasjtunararnir har vilja ikki góðtaka, at myndugleikarnir hava sett tadjikan Ismail Khan til guvernør í landspartinum.

Sambært pakistanskum fjølmiðlum hava hermenn hjá Ismail Khan eisini verið í bardaga við menn hjá øðrum krígsharrum seinastu dagarnar. Eisini í hesum bardøgunum hava fleiri fólk latið lív, verður sagt.kv





STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR

Stationerir og transportablir størri samt smærri

Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008



Brandt
Blomberg




Hvítvørur til føroyska húsarhaldið

- 6 kg turr klæðir
- 600-1600 snúningar
- Tíðarstýring 1-24 tímar
- Orkuklassi A
- Vaskievni A
- Centrifugeringsevni A

prísur fyrr 9.995,-
Nú 8.995,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



Brandt
Blomberg

Hvítvørur til føroyska húsarhaldið

Turkitrumla

5 kg av klæðum

Tíðarstýrd til lágan og høgan temperatur

prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-



pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460


## Hálvársroknskapur 2002

Í 1.000 kr.

| Rakstrarroknskapur | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m | 148.201 | 157.359 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 52.042 | 66.921 |
| Rentuinntøkur netto | 96.159 | 90.438 |
| Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum | 264 | 401 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur | 7.995 | 5.693 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir | 337 | 23 |
| Rentu- og ómaksgjøld netto | 104.081 | 96.509 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra | -4.216 | 500 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 2.762 | 2.796 |
| Úrslit av fíggjarpostum | 102.627 | 99.805 |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m og umsiting | 59.091 | 51.055 |
| Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 4.056 | 5.720 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 378 | 484 |
| Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) | 9.981 | 3.199 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 142 | -1.377 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 29.263 | 37.970 |
| Skattur | 5.812 | 8.039 |
| Úrslit eftir skatt | 23.451 | 29.931 |

| Fíggjarstøða | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 33.430 | 39.761 |
| Áogn í lánistovnum | 354.609 | 350.960 |
| Útlán | 3.540.565 | 3.160.450 |
| Lánsbrøv v.m. | 712.923 | 674.775 |
| Partabrøv v.m. | 93.041 | 69.522 |
| Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 19.729 | 7.524 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 1.134 | 858 |
| Óítøkiligar ognir | 0 | 0 |
| Ítøkiligar ognir | 136.089 | 131.889 |
| Onnur ogn | 48.378 | 17.449 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | 3.918 | 7.423 |
| Ogn tilsamans | 4.943.816 | 4.460.611 |
| **Skuld** | | |
| Skuld til lánistovnar | 116.086 | 134.949 |
| Innlán | 3.902.688 | 3.494.293 |
| Onnur skuld | 71.631 | 46.492 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | 0 | 0 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 6.382 | 3.553 |
| Eginpeningur: | | |
| Partapeningur og ábyrgdarfæ | 663.799 | 11.028 |
| Grunnar | 159.779 | 2.504 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 0 | 737.861 |
| At flyta frá ársins úrsliti | 23.451 | 29.931 |
| Eginpeningur tilsamans | 847.029 | 781.324 |
| Skuld tilsamans | 4.943.816 | 4.460.611 |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan** | | |
| Ábyrgdir | 110.802 | 81.825 |
| Aðrar skyldur | 75.631 | 103.739 |
| Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan tilsamans | 186.433 | 185.564 |

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo